


www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 12 - 2012

# Faroe Petroleum betrar um framtíðar møguleikar

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum hevur gjørt avtalu við fíggingarstovnar, sum fer at betra munandi um framtíðar virksemið hjá felagnum. Meirfígging Virksemið hjá sjálvstøðuga olju- og gassfelagnum Faroe Petroleum er í høvuðsheitum savnað um leiting, meting og framleiðslumøguleikar á Atlantsmótinum, Norðsjónum og Noregi. Felagið boðar nú frá, at tað hevur undirskrivað øktar lánimøguleikar frá bankunum og gevur hetta munandi meirfígging til felagsins vakstrarætlanir. Nýggju lánimøguleikarnir tvífaldast til 1 milliard NOK (uml. GBP 110.000.000). Víðkaðu fíggjarkarmarnir eru ætlaðir at stuðla undir felagsins verandi virksemi á norskum øki, sum saman við avgjaldsafturberingini frá norska statinum gjøgnum oljuskattalógina, fer at økja um felagsins gjaldføri. Trygt grundarlag Upprunaliga lánitíðin er longd við einum ári fram til 31. desember 2015. Allir sjey bankar felagsins (BNP Paribas, Lloyds TSB Bank plc, Commonwealth Bank of Australia, DNB Bank ASA, Royal Bank of Scotland plc, SEB og SR Bank) luttaka í víðkaðu fíggjarkarmunum. Saman við felagsins góða gjaldføri og peningarenslinum frá teimum framleiðandi eindunum, íroknað Blane, Brage, Njord og Ring Horne East Fields, merkir hetta, at felagið byggir á trygt fíggjarligt grundarlag í sínum framtíðarætlanum. Herðaklapp Sum viðmerking til nýggju fíggingarmøguleikarnar sigur Iain Lanaghan, fíggjarstjóri hjá felagnum - "Vit fegnast um hesar nýggju fíggjarkarmarnar, sum saman við øðrum lánimøguleikum tvífalda okkara gjaldføri í 2012. Vit merkja týðandi álit frá okkara bankum, sum allir luttóku í hesum umfarinum. Hetta er eitt herðaklapp til okkara felag, framtíðarætlaninar og virðini í felagnum. Saman við okkara trygga peningarensli frá framleiðsluni geva nýggju fíggjarmøguleikarnir okkum betri førleikar at víðka um felagið gjøgnum okkara høvuðsvirksemi og keypi av nýggjum, framleiðandi eindum.